gult24 cyan24 magenta24 svart24


# ítróttur

Nr. 71 • mikudagur • 11. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# – Eg eri United fan



Ingi tykist fegin, nú hann skal skifta hvítu B36-troyggjuna um við tí reyðu hjá Arsenal

Mynd: Jens Kr. Vang

**Ironiskt hevur Ingi Højsted, sum júst hevur skrivað sáttmála við enska stórfelagið Arsenal, alt sítt lív verið Manchester United fan, og tá Arsenal og United altíð hava verið argastu fíggindar, stendur Ingi nú í einum lítlum trupulleika**

YRKISDREYMUR
*Heini í Skorini*

Ingi Højsted má á ongan hátt avdúka sína “kriminellu” fortíð sum United fan, tá hann í juli mánaði í ár byrjar sum sáttmálabundin yrkisleikari í Arsenal. Í Arsenal er Manchester United nevniliga eitt bannað orð, við tað at Arsenal seinastu árini, undantikið 1998, hevur staðið í skugganum av Manchester United. Bæði í Europa og í ensku Premier League.

Men Ingi sigur sjálvandi, at Arsenal er eins gott og Manchester United, bert felagið er eitt stórt felag.

## Einasti út av 1500

Í Arsenal eru hagtøl viðvíkjandi ungum leikarum júst gjørd, sum siga, at fyri hvørjar 1500 leikarar, sum royndarvenja við felagnum, er bert ein, sum fær sáttmála.

Ingi Højsted er sostatt einasti av øllum teimum 1500, sum hevur fingið sáttmála, og tað sigur ikki so lítið um evnini hjá Inga sum fótbóltsleikara. Ingi sigur, at Arsenal nú hyggur meiri eftir ungum leikarum í Norðurlondum, og at teir fyri stuttum hava skrivað sáttmála við ungan svia. Eftir teir báðar er bert ein annar skandinavi undir 23 ár, og er tað ein dani.

## Venjararnir ikki hvørjir sum helst

Ingi Højsted fer í juli í summar til Arsenal, og skal hann beinanvegin í eldin. U-17 liðið hjá Arsenal hevur nevniliga boðið Inga við til eina kapping í Fraklandi, og hetta verður fyrstu ferð, at Ingi sum Arsenal leikari spælir dyst við nýggja felagi sínum.

Ungdómsvenjarin í Arsenal og venjarin hjá Inga Højsted, er ikki hvør sum helst. Hann eitur Liam Brady, og hevur hann sum yrkisleikari spælt við italska stórfelagnum Inter og Arsenal, samstundis sum hann var ein sera týdningarmikil leikari fyri írska landsliðið. Tað er Liam Brady, sum hevur havt eyguni við Inga og avgjørt, at hann skal hava sáttmála frá Arsenal, og hyggja vit at fortíð hansara í fótbólti, veit maðurin, hvat hann keypir. Hetta sigur heldur ikki so lítið um Inga sum fótbóltsleikara, við tað at ein og hvør fær ikki bjóða sáttmála frá so stórum felagi.

Tað, sum rópt verður “headcoach” í Arsenal, er heldur ikki hvør sum helst. Maðurin eitur Don Howe, og var hann enskur landsliðsvenjari í 1982. Sostatt hevur Ingi gott fólk kring seg, sum vita, hvat skal til fyri at gera hann til eina komandi stjørnu.

Tá vit spyrja Inga, um hann væntar at leingja um sáttmála sín eftir trý ár, sigur Ingi, at um tað gongur væl, væntar hann, at Arsenal eru sinnaðir at leingja um sáttmálan.

## Venjing tvær ferðir um dagin

Ingi Højsted skal venja tvær ferðir um dagin í Arsenal, meðan hann samstundis skal ganga í skúla. Mikudagur verður skúladagur hjá Inga, og eisini verða hann og aðrir undirvístir í, hvat tað er at vera yrkisleikari, har lært verður um kroppin o.s.fr.

Ingi stendur sostatt ikki á berum, um tað ikki skuldi gingið til vildar hjá honum. Venjing tvær ferðir um dagin er krevjandi, og Ingi sigur, at hetta verður hart, men at hann er sinnaður at arbeiða hart, eins og hann hevur gjørt. Ingi hevur vant nógv sjálvur, og hart arbeiði einsamallur hevur givið úrslit.

## Hevur prátað við Keown

Ein av týdningarmiklastu leikarunum á besta liðnum hjá Arsenal og á enska landsliðnum, er verjuleikarin Martin Keown. Ingi hevur longu fingið sær eitt fótbóltsprát við Martin Keown, meðan hann ikki hevur heilsa uppá sjálvan venjaran á Premier League liðnum, fraklendingin Arsene Wenger. Vónandi hevur Keown givið Inga nøkur góð ráð, sum hann tekur til eftirtektar.

Ingi kemur ongantíð at hótta Keown um fast pláss á liðnum, við tað at Keown væntandi er givin, tá Ingi kemur til, men frá juli kunnu stjørnur á miðvøllinum sum Parlour, Ljungberg, Lauren, Viera og Pires ikki kenna seg tryggar longur, tí nýggja stjørnuskoti Højsted er á veg......

# – Vit eru ikki bangin at lata hann fara



Foreldrini hjá Inga Højsted eru als ikki bangin fyri at lata sonin fara til Onglands at royna seg

Mynd: Jens Kr. Vang

**Foreldur Inga Højsted, funningsmaðurin John Højsted og Ása Højsted úr Vestmanna, siga seg ikki vera bangin at lata 15 ára gamla sonin fara til Bretlands sum yrkisleikari**

FÓTBÓLTUR
*Heini í Skorini*

Foreldur Inga Højsted, John og Ása Højsted, hava góðar vónir fyri syni sínum Inga í Arsenal. Tá vit spurdu John, um hann ikki er bangin fyri at lata son sín fara til Arsenal, sigur hann, at tað er hann ikki.

– Fyrst var Ingi og royndarvandi í Arsenal, har hann seðgi okkum, hvussu tað var. Vit vóru sjálvandi atfinnandi at byrja við, kanska serliga mamman. Men eftir at vit hava verið niðri í London og sæð umstøðurnar, eru vit ikki bangin at lata hann fara. John sigur, at umstøðurnar eru sera góðar, og at leiðslan og ungdómsvenjararnir taka sær sera væl av dreingunum í Arsenal.

Mamma Inga, Ása, sigur eins og maðurin, at tey vóru sera skeptisk at byrja við, men at tey nú vita, at Ingi er í góðum hondum, eftir at hava verið har niðri og sæð umstøðurnar og møtt venjararnar í Arsenal.

John Højsted sigur, at Ingi hevur spælt fótbólt síðani hann var heilt lítil, og um hetta er tað hann vil, vilja foreldrini ikki forða honum at fara.

Spurdur, um hann einaferð væntar at síggja Inga á besta liðnum hjá Arsenal, sigur John, at tað væntar hann.

- Um hann verður eins áhugaður og hann hevur verið, skuldi møguleikin avgjørt verið til staðar, endar John Højsted, pápi møguliga komandi stjørnu á besta liðnum hjá Arsenal, Inga Højsted.

gult25 cyan25 magenta25 svart25



# Ingi Højsted upplivir dreymin

**Á tíðindafundi í B36 húsinum mánadagin varð staðfest, at bert 15 ára gamli B36 leikarin Ingi Højsted hevur skrivað undir 3 ára sáttmála við ein av risunum í ensku Premier League, Arsenal. Hetta er uttan iva størsti handil higartil í føroyskari fótbóltssøgu, og ævintýrið hjá Inga Højsted byrjar í juli**

FÓTBÓLTUR
*Heini í Skorini*

15 ára gamli B36 leikarin Ingi Højsted hevði mánadagin úr at gera í B36 húsinum, tá hann eftir tíðindafund fyri fjølmiðlunum var umringaður av sjónvarpsfólki, útvarpsfólki og blaðmonnum, og tað var ikki so løgið. Størsti handilin í føroyskari fótbóltssøgu var nevniliga júst almannakunngjørdur av formanninum í B36, Kristan á Neystabø, og 15 ára gamli havnardrongurin er nú farin undir tað ævintýr, sum Todi Jónsson, Julian Jónsson, Kurt Mørkøre og Jákup Mikkelsen allir droyma um.

Ingi Højsted byrjar nevniliga í juli í summar sum sáttmálabundin leikari við millum fremstu liðunum í Europa í løtuni, stjørnusetta London liðnum Arsenal. Sáttmálin er uppá 3 ár, og Kristian á Neystabø seðgi á tíðindafundi mánadagin, at sáttmálin er góður fyri allar partar.

## U-16 NM kapping var byrjanin

Kristian á Neystabø legði út í B36 húsinum mánadagin, har hann fyrst og fremst boðaði frá stórtíðindunum. Hann segði, at í B36 hava teir havt eitt mál, at í hvussu so er ein leikari úr hvørjari ungdómsdeild skal koma inn á 1. liðshópin, og so má tíðin vísa, um ein kemur víðari harífrá. Men tað kom óvæntað á hann, at ein skuldi leypa hetta stig um, og sum 15 ára gamal at fara til ongan minni enn Arsenal.

Jákup í Stórustovu, sum hevur fingið handilin til rættis, og sum seinastu árini hevur arbeitt við at fingið ungar føroyskar leikarar út um landoddarnar at royna seg, tók síðani orðið á tíðindafundinum. Hann segði, at áhugin fyri Inga Højsted byrjaði í fjør, tá Norðurlandameistaraheitið fyri u-16 landslið varð spælt í Føroyum. Føroyar var sum kunnugt við, og leikti u-16 landslið okkara móti Danmark, Onglandi, Finlandi og Noregi. Ingi spældi á miðvøllinum hjá føroyingum, og hann spældi eftir øllum at døma so væl, at útlendskir talenteygleiðarar, sum vóru fleiri í tali, løgdu merki til vælleikandi føroyska miðvallaran. Stutt aftaná setti Arsenal seg í samband við B36, og eftir fleiri royndarvenjingar niðri í London hevur Arsenal valt at geva Inga sáttmála.

Jákup í Stórustovu segði, at hetta er úrslit av langtíðararbeiði, og at tað tískil var ein stórur dagur mánadagin.

## Góður sáttmáli

Sáttmálin hjá Inga við Arsenal er sum nevnt av Kristani á Neystabø ein góður sáttmáli fyri allar partar. Ingi fær skúlagongd, hóast mestur dentur verður lagdur á fótbóltin. Ingi velur sjálvur fleiri av lærureinunum, og sostatt er hann tryggjaður á tann hátt, at um tað ikki skuldið gingið sum ætlað, hevur hann tó skúlagongd, sum hann kann byggja víðari á.

Hetta er sera gott fyri Inga, tí fyri bert nøkrum árum síðani upplivdu eitt ótal av ungum enskum leikarum at verða vrakaðir, og hareftir at standa á berum uttan útbúgving. Í Danmark hevur í fleiri ár verið ansað eftir, at ungir leikarar ikki uppliva slíkt, og hetta hevur altíð verið ein myrk síða í útlendskum fótbólti. Men eftir øllum at døma skuldi hetta ikki hent fyri Inga, sum foreldur hansara uttan iva eru glað fyri.

Viðvíkjandi peningi hevur hvørki Ingi Højsted, Jákup í Stórustovu ella B36 loyvi at úttala seg um, men Kristian á Neystabø segði á tíðindafundinum mánadagin, at B36 eisini fær væl av peningi burturúr. Europeiska fótbóltssambandið, UEFA, hevur nevniliga eina lóg, sum sigur, at lítil feløg skulu hava pening fyri leikarar, sum eru uppvaksnir hjá teimum, so tey stóru liðini ikki bert fara avstað við teimum uttan at gjalda.

Um Ingi eftir 3 ár leingir um sáttmála sín við Arsenal, ella um Ingi fer víðari til annað stórfelag, fær B36 eisini munandi meiri pening burturúr tá, og um Ingi einaferð í framtíðini fær dystir á besta liðnum, fær B36 eisini nógv størri upphædd enn talan er um nú. Alt hetta er við í sáttmálanum millum feløgini. Viðvíkjandi løn hjá Inga er einki upplýst, men væntast kann, at talan ikki er um smáar upphæddir, tá liðið eitur Arsenal og er í fjórðingsfinaluni í Champions League.

## 15 lið vildu hava Inga

Men Arsenal er ikki einasta liðið, sum hevur lagt merki til fótbóltsevnini hjá Inga Højsted. Ingi hevur eisini verið í royndarvenjing í hollendska stórfelagnum PSV Eindhoven, sum í løtuni er besta felag í Hollandi. Umframt Arsenal er PSV Eindhoven einasta felag, sum Ingi hevur vant við ígjøgnum seinasta árið, men heili 15 onnur lið vildu hava Inga til royndarvenjing. Ingi sigur, at teir gjørdu av bert at velja tvey stórfeløg úr rúgvuni, sum hann so hevur vant við, tí tað hevði tikið alt ov langa tíð at ferðast runt til øll liðini, sum sýndu áhuga. Ingi hevur tó onga orsøk at angra nakað, við tað at hann kundi næstan ikki fingið ein betri arbeiðsgevara í London liðnum Arsenal.

Ævintýrið hjá Inga Højsted sum yrkisleikari í Arsenal í London byrjar í juli, har hann skal arbeiða fram ímóti einaferð at gerast liðfelagi hjá leikarum sum Thierry Henry, Patrick Vieira, Robert Pires, Tony Adams, Dennis Bergkamp og Sylwain Wiltord, har fleiri teirra eru bæði heims- og europameistarar.



Ingi Højsted er her avmyndaður saman við formanninum í B36, Kristian á Neystabø, og fótbóltsumboðsmanninum, Jákup í Stórustovu

# Ingi er úrslit av langtíðararbeiði

**Jákup í Stórustovu, fyriskipari av handlinum millum Arsenal og B36 við Inga Højsted, hevur leingi arbeitt miðvíst við ungum føroyskum leikarum, og møguleikin hjá Inga Højsted at spæla við Arsenal er úrslit av arbeiði í longri tíð**

FÓTBÓLTUR
*Heini í Skorini*

Tá vit spurdu Jákup í Stórustovu, hví Ingi Højsted er tann fyrsti, sum hevur fingið sáttmála, tá fleiri ungir føroyskir leikarar undan honum hava verið uttanlanda, sigur Jákup, at nú eru vit komin eitt stig víðari.

- Teir fyrstu leikararnir, sum vóru uttanlanda og vandu við ymiskum feløgum, vóru partur av eini verkætlan, har vit royndu at gera vart við føroyskan fótbólt. Vit góvu samstundis føroysku leikarunum møguleikan at venja við útlendskum feløgum og síggja, hvussu tað er uttanlanda. Nú eru vit so komin eitt stig víðari, har útlendsku feløgini skulu venda sær til okkum, um áhugi er fyri leikara.

Jákup í Stórustovu segði á tíðindafundinum í B36 húsinum mánadagin, at teir arbeiða fram ímóti at fáa tríggjar leikarar afturat Inga at skriva undir sáttmála við útlendsk feløg, áðrenn hetta árið er farið.

Jákup sigur, at fleiri aðrir føroyskir leikarar hava møguleikan at fáa sáttmála, eins og Ingi Højsted nú hevur fingið, og verður tað sera spennandi at síggja, um aðrir ungir føroyskir leikarar megna at gera tað sama sum Ingi Højsted.

Tá vit spyrja Jákup, um hann einaferð væntar at síggja Inga Højsted á besta Arsenal liðnum, er hann skjótur at svara.

- Tað ivist eg ikki í, og tað ivast teir í Arsenal heldur ikki í, endar Jákup í Stórustovu, sum hevur fingið handilin í lag.